## Talið á akførum í Føroyum er alsamt vaksandi

**Í tíðarskeiðnum januar-september 2000 vórðu 199 innfluttir persónbilar skrásettir í Føroyum. Sama tíðarskeið í ár, var talið komið upp á 236**

AKFØR
*Ingrid Bjarnastein*

Í tíðindaskrivi frá Bileftirliti Føroya stendur, at samlaða talið á innfluttum akførum í Føroyum í eitt níggju mánaða skeið, er vaksið 31,41% í mun til sama tíðarskeið í fjør.

Talið á skrásettum persónbilum er vaksið við 18,59% í mun til í fjør.

Ein tann størsti innflutningurin í ár, hevur verið motorsúkklurnar. Har hevur verið ein prosentvøkstur uppá heili 130,77 %.

Størri áhugi vísir seg eisini at vera fyri ellisakførum. Í fjør frá januar til september var bara eitt ellisakfar innflutt, meðan í ár eru trý ellisakfør komin til Føroya.

Eisini er talið á bussum vaksið í mun til í fjør. Seinastu níggju mánaðarnar hava føroyingar innflutt fýra nýggjar bussar, har føroyingar frá januar til september í fjør innfluttu tveir bussar.

Tølini vísa, at bilatalið í Føroyum veksur alsamt á flestu økjum. Nakrar fáar lækkingar eru á summum økjum, men hava tær ikki stóra ávirkan á vaksandi innflutningin.

## Sølurásin 2001

**Tíðindaskriv**
*Skála Ítróttarfelag*
*Skála Róðrarfelag*
*Stranda Ítróttarfelag*
*Strálan*

**Sølustevna:** Aftur í ár verður skipað fyri sølustevnu í ítróttarhøllini á Skála vikuskiftið 3. og 4. november.

Tað eru ítróttarfeløgini á vestara armi á Skálafjørðinum, sum skipa fyri, og eru fyrireikingarnar komnar væl áleiðis. Høllin er um at vera fylt við framsýnarum.

Sigast kann, at áhugin fyri at verða við, er sera stórur millum framsýnarar. Í fjør høvdu vit yvir 3000 vitjandi. Á stevnuni verður ymiskt undirhald.

Har verða millum annað mótasýningar, klovnar, gandakallar, búktalari, Ragnar í Vík, Birgir og Jónsvein og barnakórið, Eg eri ein K. Meira um stevnuna fæst at vita seinni í mánaðinum í øllum fjølmiðlum.

## Søga um kærleika, longsul og tónleik

**Føroyskar bygdir, danskir býir og Italia eru karmur um søgugongdina í nýggjari skaldsøgu eftir Adda Lykkeboe, danskan rithøvund, sum er vaksin upp í Føroyum**

ÚTGÁVA
*Turið Kjølbro*

Forlagið Modtryk gevur í næstu viku út skaldsøguna »Balladen om Antonie« eftir Adda Lykkeboe. Føroyskar bygdir, danskir býir og Italia er karmur um søgugongdina, sum byrjar fyrst í 1900-talinum og endar í 1970-unum. Hetta er ein ættarsøga um, hvussu Erkaeingilin Gabriel fær ein týdningarmiklan leiklut í lívi Antoniu, sum er fruktin av sambandi millum føroyingin Anders og italsku Lorenzu. Um hvussu ringt tað er at velja og hvørjar avleiðingar val hava fyri fólk rundan um ein.

Adda Lykkeboe búði sum barn og ung í Føroyum, har hon gekk í skúla hjá nunnunum. Føroyska náttúran og mentanin hava havt stóran týdning fyri hana. Katólska heimin frískaði hon upp aftur seinni við at ferðast í Italia, har hon býr við havið. Eitt langt arbeiðslív hevur Adda Lykkeboe virkað sum bókavørður. Í 1999 kom fyrsta skaldsøga hennara út, »Kontrakten«, ein nógv róst erotisk skaldsøga. »Balladen om Antonie« er sostatt hennara næsta skaldsøga.

# Oljutingið viðgjørdi boringarnar



*Magni Arge og Ben Arabo søgdu frá hvør sínari síðu av oljuvinnuni á fundi hjá Oljutinginum mikukvøldið.*

**Oljutingið helt mikukvøldið fund í Listaskálanum. Fyrstu boringarnar og flúgvingin í sambandi við oljuvinnuna í Føroyum stóðu á skránni**

TING
*Heri á Rógvi*

Oljutingið er ein tvørfakligur felagskapur fyri fólk og fyritøkur við áhuga og/ella tilknýti til oljuvinnu. Oljutingið kunnar um oljuvinnu og virksemi, ið er knýtt at oljuvinnu við, fyrilestrum og øðrum tiltøkum. Oljufelagið hevur ikki nakað vinnuligt endamál.

Soleiðis stendur at lesa í endamálsorðingini hjá Oljutinginum. Tað er um 200 limir í Oljutinginum.

Mikukvøldið hittust limirnir so til ein fund, har tveir fyrilestrar stóðu á skránni.

Ben Arabo er ein av teimum føroyingunum, sum hevur verið longst við í oljuvinnuni í Føroyum. Hann greiddi á fundinum frá virkseminum hjá Amerada Hess í sambandi við teirra boringar. Hóast hann kanska skuldi havt tosa eitt sindur um boringarnar hjá hinum eisini, so eru hesar so mikið líkar, at hann valdi at taka leggja fram við støði í teirra egna virksemi.

Hann greiddi serliga frá um tann tekniska partin av borivirkseminum. Hann vísti á, hvussu nógv tilfar og útgerð skulu til í sambandi við boringarnar í Føroyum, eins og aðrastaðni. Hann segði eisini eitt sindur um, at at kalla øll teirra útgerð og tilfar kemur úr Aberdeen.

Hann vísti, at á rigginum, sum teir nýta, Sovereign Explorer, so eru 11 av 94 starvsfólkum føroyingar. Hann segði ikki nakað, um teir høvdu fingið nakað úrslit. Aftaná undirstrikaði hann eisini, at hann heldur ikki ætlar at lata tað »leka« út.

Hin fyrilestrarhaldarin var Magni Arge. Hann greiddi nærri frá teirra leikluti í sambandi við oljuvinnuna í Føroyum.

Hann vísti á, at teir hava gjørt seg nógvar og góðar royndir av arbeiðinum innan oljuvinnuna. Atlantic Airways samstarva í løtuni við Bristow í sambandi við flúgvingina til og frá boripallinum.

Hann segði eisini, at Atlantsflog ætla at bíða við at gera nakrar størri íløgur til teir vita meira um, hvussu boriúrslitið verður.

Næsta tiltakið hjá Oljutinginum verður eitt slag av einum jólahaldi.

# Vinnuhúsið gjørt ferð til Hetlands

**Í døgunum 24.-25. sept. vóru umleið 35 fólk, ið umboða vinnulívið í Føroyum á ferð í Hetlandi. Hendan ferðin varð gjørd fyri at kanna, hvussu vinnulívið í Hetlandi er – eisini í sambandi við olju**

VINNA
*Ingrid Bjarnastein*

Mánamorgunin 24. sept. fóru 35 føroyingar við leiguflogfari til Hetlands. Við á ferðini vóru føroysk virkir, umboð frá oljumálastýrinum, umboð frá Vinnuhúsinum og tvey vóru umboðini frá Tórshavnar Kommunu.

Malan Johansen frá Vinnuhúsinum greiðir frá:

– Tá vit komu niður vóru vit móttikin av Shetland City Council. Tey fortaldu okkum eitt sindur um Hetland, og hvussu tað varð skipað. Síðani fingu vit høvi at seta spurningar.

Malan Johansen sigur, at tað tey fingu fortalt um Shetland minti ógvuliga nógv um Føroyar í 80'unum.

Føroyingarnir fingu eisini møguleika at greiða frá Føroyum og viðurskiftunum her uppi. Síðani varð koyrt til Sullum Voe. Sullum Voe er staðið har oljan kemur á land frá oljuøkjunum har um leiðir.

Síðani varð koyrt aftur til Lerwick, har føroysk virkir fingu møguleika at møta hetlendskum virkjum.

Um kvøldið bjóðaði Shetland City Council til døgurða, og longu týsmorgunin 25. september um 10 tíðina vóru vinnufólkini aftur í Føroyum.

– Tosað varð um, at fáa hetlendingarnar til Føroya seinni, men fyribils hevur tað ikki verið meira enn tos, sigur Malan Johansen.



## Hvat Nú?

*- Sendingin við norðurlendskum dansitónleiki*




*Í flestu av hinum norðanlondunum eru líknandi sendingar sum sendingin Hvat Nú?, ið er dagsskrá hjá Útvarpi Føroya hvønn mánadag kl. 17.00.*

*Í sendingini Hvat Nú? hesaferð, veður prátað við Erik Forfod ið hevur norska dansitoppin, og sendingina På Dansefot, ið er dagsskrá hjá NRK 1, hvørt leygarkvøld kl. 21-23.*

*Erik Forfod, ið er kendur útvarpsmaður í Noregi, greiðir frá dansitónleikinum í Noregi, og sendingini hann ger í norska útvarpinum.*

## Okkara matstovur




*Í 9 sendingum fara vit at vitja okkara matstovur. Mánakvøldið er Guðmundur Guðmundsson á Hotel Norð á Viðareiði, har kokkurin borðreiður við forrætti úr toskaflaki, høsnalivrapaté og lambakjøtsrætti.*

### The River Wild




### Føroyskt møti úr Eliaskirkjuni í Keypmannahavn




### Delta Kliken




### Harem 2001 (1)

